## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Fyrst á degnum møguliga stormur av vestri og útnyrðingi, 18 til 23 m/s, sum minkar til andøvsgul upp í ein strúk, 8 til 13 m/s. Skýggjað av og á og kavaælingur. Hitin millum frostmarkið og 3 stig. Út á náttina eitt lítið lot av landssynningi, 3 til 8 m/s. Meira skýggjað og kavi.




**Hósdagin:**
Vindurin veksur av landssynningi og seinni upp til hvassan vind av vestri, 10 til 15 m/s. Skýggjað, kavi og eitt bil kanska vátakavi. Hitin um frostmarkið. Seinast á degnum andøvsgul upp í strúk av norði og útnyrðingi, 8 til 13 m/s, men minkar so aftur út á náttina. Skýggjað av og á og kavaæl. Hitin minkar.

**Fríggjdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, 5 til 10 m/s, som helst fer í ein útsynning og minkar síðani til eitt lot til andøvsgul, 3 til 8 m/s. Fyri tað mesta skýggjað, kavaæl og seinni kavi. Hitin millum frostmarkið og 3 stig undir frostmarkið

# Djarvt Harkalið, Snjóugla og Spor í sjónum

**Tutl hevur endurútgivið nakrar gamlar útgávur, sum hava verið á plátu, og harvið ført nakrar klassikarar yvir á fløgu**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*




Tað eru nú nøkur ár síðani, at Tutl setti sær fyri at fáa út á fløgu nógv av góða, gamla tilfarinum, sum finst á plátu.

Og væl hevur gingist og nógvar Lp-plátur og single-plátur eru nú at fáa á fløgu, men enn eru nakrar eftir.

Men nú fyri jól er aftur bøtt um føroyska fløgusavnið.

Tutl gav 20. desember út 3 nýggjar útgávur. Ella rættari er óivað at kalla hetta endurútgávur. Hvør í sær standa hesar útgávur sterkar. Tær eru ymiskar, men hava tó tað felags, at tær standa sterkar og eru klassikarar.

Spor í sjónum/spor i vandet hjá Anniku Hoydal er ein av hennara væl dámdu og virðismettu útgávum, eins og mangar av útgávum hennara eru. Men hendan útgávan hevur lýst og verið tikin fram, tá útgávusavn hennara hevur verið nevnt. Nú hevur Tutl givið útgávuna út á fløgu.

Vit fylgja Anniku yvir í Harkaliðið. Harkaliðið og útgávan Nýtt og Grovt Gamalt ber boð um skemtiliga og argandi lyndi, ið bólkurin hevur borgað fyri í eini 30 - 35 ár. Tíðarinnar tonn er kanska farin við bondum og plátum, men ikki við skemtivísunum, ið Jógvan, Kári, Jógvan og Annika so hegnisliga hava borið fram øll hesi ár. Og eisini hava tey dugað at fylgt við tíðini. Og tíðin vil hava fløgur og Tutl hevur nú syrgt fyri, at henda útgávan fæst á fløgu.

Snjóuglan hjá Kristian Blak er eisini ein av mongu útgávum hansara, sum er sermerkt, men sum stendur frammaliga, tá tosað verður um útgávusavn hansara. Hann hevur verið sera virkin og tað er at fegnast um, at tónleikur hansara verður førdur á fløgu, so tey, ið hava forkomið plátuspælaranum, nú hava møguleika at ogna sær hesa fløguna.

Útgávuvirksemið hjá Tutl, har plátur og bond verða førd á fløgu, heldur fram, og er hetta at fegnast um, tí soleiðis verður bøtt um møguleikarnar framvegis at ogna sær og spæla gamlar perlur.

## V4-dráttur

### í drátti nr. 1568 18.des. 2004

**Tølini:** 2-10-14-20-21-26-27-30-34-42-51-56-67-80-82-94

### Vinnararnir eru:

Ongin vinnari var funnin. Vinningurin er fluttur til næsta drátt

### Eykavinningar:

Snars. nr. 2888032 (Klaksvík)
Snars. nr. 2950587 (Hornið SMS)
Snars. nr. 2660451 (Farseðil)
Snars. nr. 2918451 (Løðuhandilin í Sørvági)
Snars. nr. 2937613 (Shellstøðin við Streymin)
Snars. nr. 2958201 (Shellstøðin í Vági
Vanl. s. nr. 389803 (Leirvík)

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 4 |
| Tromsø | -4 |
| Bergen | -2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -8 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -3 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 15 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | -1 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | -8 |
| Miami | 12 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár týsdag:**
Eitt lágtrýst, 995 hpa vestan fyri Ísland, dýpist og flytir seg í ein eystan, beint norðan fyri Føroyar



**Í dag**
Køld luft streymar móti Føroyum úr útnyrðingi

## HITALAGIÐ




Hitalagið márt frá 20/12 kl. 06[00]–21/12. 06[00]. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 23,0 mm – márt frá 20/12 kl. 06[00]–21/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 115,2 mm

RADIO HANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

22. desember: Fullmáni
23. desember: Mánin longst frá jørðini
24. desember:

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. des | 02.33 | 14.55 | 01.33 | 13.55 | 01.48 | 14.10 | 04.33 | 16.55 | 05.33 | 17.55 | 00.48 | 13.10 | — | 12.10 | 02.48 | 15.10 | 03.48 | 16.10 | 02.18 | 14.40 | 03.33 | 15.55 |
| 22. des | 03.17 | 15.38 | 02.17 | 14.38 | 02.32 | 14.53 | 05.17 | 17.38 | 06.17 | 18.38 | 01.32 | 13.53 | 00.32 | 12.53 | 03.32 | 15.53 | 04.32 | 16.53 | 03.02 | 15.23 | 04.17 | 16.38 |
| 23. des | 04.00 | 16.22 | 03.00 | 15.22 | 03.15 | 15.37 | 06.00 | 18.22 | 07.00 | 19.22 | 02.15 | 14.37 | 01.15 | 13.37 | 04.15 | 16.37 | 05.15 | 17.37 | 03.45 | 16.07 | 05.00 | 17.22 |
| 24. des | 04.45 | 17.08 | 03.45 | 16.08 | 04.00 | 16.23 | 06.45 | 19.08 | 07.45 | 20.08 | 03.00 | 15.23 | 02.00 | 14.23 | 05.00 | 17.23 | 06.00 | 18.23 | 04.30 | 16.53 | 05.45 | 18.08 |
| 25. des | 05.32 | 17.56 | 04.32 | 16.56 | 04.47 | 17.11 | 07.32 | 19.56 | 08.32 | 20.56 | 03.47 | 16.11 | 02.47 | 15.11 | 05.47 | 18.11 | 06.47 | 19.11 | 05.17 | 17.41 | 06.32 | 18.56 |

5 707265 100036 >